Jóhannis Joensen **Nr. 2/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um ferðsluviðuskiftir, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið viðvíkjandi farleiðini til flogvøllin?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið á vegastrekkinum við Leynatunnilin hvat viðvíkur trygd fram við landsvegi?
3. Hvørjar ætlanir eru í samband við trygd og ferðslu í Vágum? Her verður hugsað um rundkoyringar o.a.
4. Er samstarv við kommunurnar í Vágum um at tálma ferðsluni og virka fyri tryggum ferðsluviðurskiftum á vegastrekkinum til og frá flogvøllinum?
5. Hvør er ætlanin við landsvegnum í Sørvági og út til Bø og Gásadals hvat viðvíkur trygd og ferðslu?

Viðmerkingar

Kommunurnar hava ábyrgdina av kommunalum vegi í bygdum øki. Í Vágum gongur landsvegur av Fútakletti til Gásadals, tó við kommunalum veganeti í einum parti av Miðvági og Sørvági. Ferðslan økist alsamt, serliga til flogvøllin, tó at koronafarsóttin náttúrliga hevur minkað um ferðsluna vegna tað, at nógv minni av flúgving er júst nú.

Vágar og Mykines eru sera náttúruvakrar oyggjar, og tí er eisini nógvur vøkstur av útlendskum ferðafólki, sum vilja síggja ferðamál í Vágum. Hesi vitja serliga Trøllkonufingur, Trælanípu, Bø, Múlafoss í Gásadali, Mykines og Tindhólm. Ofta eru tað stórir bussar við vitjandi, og tað krevur góðan logistik. Hetta er einamest ein lokal kommunal uppgáva, men har veganetið er alment, má landið eisini vera við. Tí er tað avgerandi, at landið og kommunurnar hava felags átøk at tálma ferðsluni og tryggja tryggar ferðslukarmar fyri ferðandi og serliga tey, sum búgva í Vágum. Nevnast kann til dømis, at á vegastrekkjunum við Leynatunnilin er einki hegn fram við vegnum, og tað hevur við sær, at seyður ofta loypur út á vegin. Eisini skal viðmerkjast, at skúlabyggingin á

Giljanesi, sum skjøtil er settur á, er neyvt tengd at eini rundkoyring, sum Landsverk hevur lovað at gera.
Tørvur er á at fáa nærri at vita, hvørjar ætlanir eru á hesum økjunum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. august 2020

Jóhannis Joensen